Samandráttur

# Ársfrágreiðing 2019



BANKNORDIK

# Samandráttur av ársfrágreiðingini 2019

## Innihaldsyvirlit


Lyklatøl.......... 2
Bræv frá stjórn.......... 3
Fíggjarfrágreiðing.......... 4
Nevndarfrágreiðing.......... 10
Bankavirksemi, tilsamans.......... 14
Bankavirksemi, privat .......... 14
Bankavirksemi, vinna.......... 15
Tryggingarvirksemi.......... 15
Annað virksemi.......... 16
Partaeigarar.......... 17
Rakstrarroknskapur - BankNordik.......... 18
Konsolideraðar heildarinntøkur - BankNordik .......... 19
Fíggjarstøða - BankNordik.......... 20
Fíggjarstøða - BankNordik-samtakið.......... 21
Kapitalgrundarlag og solvensur - BankNordik.......... 22
Samband.......... 24

# Lyklatøl, BankNordik-samtakið

| **Yvirlit**<br>**DKK 1.000** | **2019** | **2018** | **Indeks 19/18** | **Q4 2019** | **Q3 2019** | **Q2 2019** | **Q1 2019** | **Q4 2018** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Rentuinntøkur, netto | 366.691 | 374.143 | 98 | 94.785 | 90.413 | 90.459 | 91.034 | 92.349 |
| Vinningsbýti av partabrøvum o.ø. | 13.984 | 11.396 | 123 | 0 | 0 | 13.743 | 240 | 83 |
| Ómaksgjøld og tænastuinntøkur, netto | 189.475 | 172.213 | 110 | 48.993 | 47.126 | 45.479 | 47.876 | 42.477 |
| Rentuinntøkur og ómaksgjøld, netto | 570.149 | 557.752 | 102 | 143.778 | 137.539 | 149.681 | 139.151 | 134.909 |
| Inntøkur frá tryggingarvirksemi, netto | 52.327 | 43.751 | 120 | 13.630 | 14.875 | 15.305 | 8.517 | 12.598 |
| Rentuinntøkur, ómaksgjøld og inntøkur frá trygging-arvirksemi, netto | 622.476 | 601.503 | 103 | 157.408 | 152.414 | 164.987 | 147.668 | 147.507 |
| Virðisjavnan | 4.395 | 7.113 | 62 | 3.172 | 749 | -15.075 | 15.548 | -5.538 |
| Aðrar rakstrarinntøkur | 14.497 | 19.947 | 73 | 3.172 | 5.612 | 2.922 | 2.791 | 2.311 |
| Útreiðslur til starvsfólk og fyrisiting | 470.980 | 459.247 | 103 | 124.754 | 113.734 | 115.784 | 116.707 | 114.145 |
| Av- og niðurskrivingar av ítøkiligum og óítøkiligum ognum | 14.923 | -43.807 | | 4.218 | 3.565 | 3.592 | 3.547 | 10.343 |
| Niðurskrivingar av útlánum og aðrari ogn v.m. | -104.928 | -110.782 | 95 | -24.573 | -8.566 | -52.732 | -19.057 | -18.033 |
| Ársúrslit | 206.631 | 262.097 | 79 | 48.418 | 39.847 | 65.946 | 52.419 | 32.763 |
| Útlán | 9.908.886 | 9.956.478 | 100 | 9.908.886 | 9.982.999 | 10.052.620 | 10.006.218 | 9.956.478 |
| Lánsbrøv til dagsvirði | 5.599.529 | 4.565.087 | 123 | 5.599.529 | 5.024.465 | 5.159.449 | 5.174.715 | 4.565.087 |
| Óítøkiligar ognir | 9.957 | 6.678 | 149 | 9.957 | 9.043 | 8.122 | 7.511 | 6.678 |
| Ognir til sølu | 1.500 | 20.364 | 7 | 1.500 | 3.865 | 19.795 | 19.795 | 20.364 |
| Ogn tilsamans | 18.173.399 | 16.703.555 | 109 | 18.173.399 | 17.618.509 | 17.715.177 | 17.417.463 | 16.703.555 |
| Skuld til lánsstovnar og tjóðbankar | 54.922 | 298.610 | 18 | 54.922 | 368.008 | 150.905 | 83.127 | 298.610 |
| Innlán og onnur skuld | 14.367.685 | 13.432.228 | 107 | 14.367.685 | 13.528.109 | 14.131.224 | 14.003.644 | 13.432.228 |
| Eginpeningur tilsamans | 2.112.335 | 1.981.742 | 107 | 2.112.335 | 2.064.175 | 2.031.275 | 1.965.329 | 1.981.742 |

| **Lyklatøl** | **31. des. 2019** | **31. des. 2018** | | **31. des. 2019** | **30. sept. 2019** | **30. juni 2019** | **31. mars 2019** | **31. des. 2018** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Solvensur** | | | | | | | | |
| Solvensprosent | 22,3 | 19,8 | | 22,3 | 21,0 | 19,6 | 19,2 | 19,8 |
| Kjarnukapitalprosent | 20,2 | 17,7 | | 20,2 | 18,9 | 17,5 | 17,2 | 17,7 |
| Veruligt kjarnukapitalprosent (CET1) | 18,8 | 17,7 | | 18,8 | 17,5 | 17,5 | 17,2 | 17,7 |
| Váðavektað ogn í mió. kr. | 10.764 | 10.621 | | 10.764 | 10.664 | 10.720 | 11 | 11 |
| **Vinningsføri** | | | | | | | | |
| Rentan av eginogn eftir skatt, % | 10,1 | 13,8 | | 2,3 | 1,9 | 3,3 | 2,7 | 1,7 |
| Kostnaður fyri hvørja inntøkukrónu, % | 59,5 | 48,6 | | 63,9 | 68,6 | 43,7 | 61,1 | 73,9 |
| Kostnaður fyri hvørja inntøkukrónu, % (javnað fyri virðisjavnan og avskrivingar) | 76,4 | 67,0 | | 80,4 | 74,3 | 71,2 | 80,0 | 83,2 |
| Ognaravkast | 1,1 | 1,6 | | 0,3 | 0,2 | 0,4 | 0,3 | 0,2 |
| **Marknaðarváði** | | | | | | | | |
| Rentuváði, % | 1,8 | 1,7 | | 1,8 | 1,6 | 1,2 | 1,4 | 1,7 |
| Gjaldoyrastøða, % | 1,4 | 1,3 | | 1,4 | 1,0 | 2,1 | 1,9 | 1,3 |
| Gjaldoyraváði, % | 0,1 | 0,1 | | 0,1 | 0,0 | 0,1 | 0,1 | 0,1 |
| **Gjaldføri** | | | | | | | | |
| Yvirdekningur í mun til lógarkrav um gjaldføri, % | 215,7 | 212,5 | | 215,7 | 225,1 | 238,3 | 221,5 | 212,5 |
| **Lánsváði** | | | | | | | | |
| Útlánsvøkstur, % | -0,5 | 4,4 | | -0,7 | -0,7 | 0,5 | 0,5 | -0,5 |
| Útlán í mun til eginognina | 4,7 | 5,0 | | 4,7 | 4,8 | 4,9 | 5,1 | 5,0 |
| Av- og niðurskrivingar við ársenda, % | 3,7 | 4,5 | | 3,7 | 3,9 | 4,0 | 4,4 | 4,5 |
| Tap og niðurskrivingar, % | -0,8 | -0,8 | | -0,2 | -0,1 | -0,4 | -0,1 | -0,1 |
| Partur av útlánum við niðursettari rentu við ársenda, % | 0,8 | 0,8 | | 0,8 | 0,8 | 0,7 | 0,8 | 0,8 |
| **Partabrøv** | | | | | | | | |
| Úrslit fyri hvørt partabrævið (nom. DKK 20), DKK | 21,8 | 27,1 | | 5,1 | 4,1 | 6,8 | 5,5 | 3,4 |
| Prísur fyri hvørt partabrævið (nom. DKK 20), DKK | 109,0 | 108,5 | | 109,0 | 102,5 | 109,0 | 108,0 | 108,5 |
| Bókað virði fyri hvørt partabrævið (nom. DKK 20), DKK | 221,6 | 207,2 | | 221,6 | 216,6 | 213,1 | 206,3 | 207,2 |
| **Annað** | | | | | | | | |
| Tal av starvsfólkum við ársenda, umroknað til heiltíð | 377 | 393 | | 377 | 383 | 390 | 393 | 393 |

# Bræv frá stjórn

**Eg fegnist um, at BankNordik hevur havt framgongd í rakstrinum og kann vísa á sterk búskaparlig úrslit í árinum annars. Bankin hevur gjørt raksturin meira effektivan og hevur lyft kundaupplivingina upp á eitt hægri støði.**

### Inntøkuvøkstur sum úrslit av styrktum kundavirksemi

Hóast umhvørvið rundanum virksemið hevur verið avbjóðandi, og áhaldandi trýst hevur verið á rentumarginalin, so økti BankNordik rakstrarinntøkurnar í 2019 og rakk eina renting av eginpeninginum á 10,1%. Kundavirksemið var høgt, og okkara tryggingarfeløg stóðu seg serliga væl. Rakstrarútreiðslurnar øktust við 4% ár-til-ár, mest orsakað av útreiðsluinflatión, men útreiðslurnar væntast at minka munandi í 2020, tá gjørd tiltøk at minka útreiðslur fáa virknað. Eins og undanfarin ár afturførdu vit niðurskrivingar fyri 105 mió. kr. í 2019, sum aftur varpar ljós á sunnu góðskuna av okkara útlánum. Nettoúrslitið var 206,6 mió. kr. (21,8 fyri hvørt partabræv). Á ársaðalfundinum fer nevndin at leggja fram uppskot um eitt vanligt vinningsbýti á 62,7 mió. kr. (7,0 fyri hvørt partabræv).

### Betri kundaupplivingar

Miðvís stig at styrkja góðskuna av okkara kundasambondum eydnaðust væl í 2019. Kundanøgdsemið batnaði munandi og varð mátað av einum sonevndum "Net Promoter Score" - og kanningar, sum triðjipartar hava staðið fyri, hava víst framhaldandi vaksandi úrslit, síðani átøkini í fjør byrjaðu. Hóast kundar okkara hava vaksandi talgildar tørvir, vísa royndir okkara, at hetta at byggja persónlig sambond og veita tænastur persónliga framvegis er ein týðandi lutur í at vinna álitið og trúfestið hjá kundum okkara í longdini. Vit arbeiða tí miðvíst við at skipa okkara tænastur, soleiðis at kundar okkara fáa tað besta av báðum heimum – einfaldar, atkomiligar og talgildar tænastur til gerandisligu bankaviðurskiftini, meðan vit framhaldandi veita persónliga og lættskiljandi ráðgeving, tá teir hava tørv á tí. Eitt av høvuðsmálum okkara í 2020 verður at halda fram á hesi kós.

### Framhaldandi øktur effektivitetur við at gera fleiri virkisgongdir sjálvvirkandi

Tvær tær størstu súlurnar undir øktum effektiviteti eru betringar og sjálvvirkan av mannagongdum og uppgávum. Umvegis eina mannagongd, sum er ávirkað av Lean, miða vit alsamt eftir at streymlinja okkara uppgávur og mannagongdir, og við at nýta tólmennistøkni, fara vit stigvíst at gera alsamt fleiri umsitingarligar uppgávur sjálvvirkandi. Meira enn ein millión rakstrarligar gerðir, sum áður vóru gjørdar manuelt, vórðu framdar sjálvvirkandi í 2019, og fleiri virkisgongdir eru bøttar munandi. Vit vænta, at vit kunnu økja okkara framleiðslu í 2020 orsakað av sjálvvirkan og bøttum mannagongdum, sum fer at hava jaliga ávirkan á lønsemið hjá samtakinum.

### MREL-krøv fráboðað

Í november varð fráboðað, at MREL-krøvini hjá BankNordik vóru tvær ferðir kapitalkrøvini, tá ið systemiski buffarin og sykliski buffarin ikki eru taldir við. Vit vænta at dekka tað mesta av MREL-ískoytinum við at geva út Tier 3 partabrøv, sum fara at fáa MREL kapitalprosentið til at liggja í leguni 31-34% í 2024. Hóast BankNordik er væl fyri til at møta komandi MREL-krøvunum, so fer avleiðingin uttan iva at vera, at færri verkætlanir fara at vera áhugaverdar hjá BankNordik at fíggja. Hetta ger tað neyðugt at økja fokus á at optimera okkara váðavektaðu ognir og at bøta váðavektaða avkastið fyri partaeigarar okkara heldur enn at søkja áhaldandi útlánsvøkstur sum so.

### Strammari strategiskt fokus

Í 2019 tóku vit avgerandi stig til at stramma bankans strategiska fokus og verja lønsemið. Umframt at vit kunngjørdu negativa rentu fyri bæði privat- og vinnukundar, so konsolideraðu vit okkara deildarnet í Danmark við at lata tvær deildir aftur og góvust við at bjóða private banking-tænastur til nýggjar kundar. Broytingar vórðu eisini gjørdar í bygnaði og prísáseting av fyrimunaskipan bankans. Hesi átøk, sum lækkaðu útreiðslurnar og øktu inntøkurnar, væntast at økja rakstrarúrslit samtaksins við 40 mió. kr. árliga.

### Skapa virði fyri allar partaeigarar

Í 2020 fara vit at leggja okkum enn meira eftir at styrkja okkara kundasambond, gera bankaupplivingina einfaldari og styrkja rakstrareffektivitetin. Vit gera hetta saman við einum stórum ynski um at hava eina positiva ávirkan á okkara kundar, starvsfólk, nærsamfeløgini, sum vit virka í, og umhvørvini, sum vit liva í. BankNordik stuðlar heimsmálunum hjá ST, og vit fara at leggja serligan dent á at arbeiða fyri framgongd á útvaldum økjum. Í hesum sambandi gleði eg meg til enn eitt ár við framstigi fyri BankNordik til fyrimuns fyri partaeigararnar, kundarnar, starvsfólkini og samfeløgini, sum vit virka í.

**Árni Ellefsen**
Forstjóri

# Fíggjarfrágreiðing

**Rakstrarroknskapur hjá samtakinum**

| DKKm | 2019 | 2018 | Q4 2019 | Q3 2019 | Q2 2019 | Q1 2019 | Q4 2018 | Q3 2018 | Q2 2018 | Q1 2018 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Rentuinntøkur, netto | 367 | 374 | 95 | 90 | 90 | 91 | 92 | 94 | 93 | 94 |
| Ómaksgjøld og tænastuinntøkur, netto | 189 | 172 | 49 | 47 | 45 | 48 | 42 | 43 | 43 | 44 |
| Inntøkur frá tryggingarvirksemi, netto | 53 | 44 | 14 | 15 | 15 | 9 | 13 | 13 | 6 | 12 |
| Aðrar rakstrarinntøkur | 49 | 45 | 14 | 13 | 11 | 11 | 9 | 10 | 15 | 12 |
| **Rakstrarinntøkur** | **658** | **635** | **172** | **165** | **163** | **158** | **156** | **160** | **157** | **162** |
| Rakstrarútreiðslur [1] | -473 | -456 | -117 | -116 | -119 | -120 | -115 | -111 | -116 | -115 |
| Sektorútreiðslur | -1 | -1 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **Úrslit áðrenn niðurskrivingar** | **185** | **179** | **54** | **49** | **43** | **38** | **42** | **49** | **42** | **47** |
| Niðurskrivingar, netto | **105** | 111 | 25 | **9** | 53 | 19 | 18 | 39 | 23 | 31 |
| **Rakstrarúrslit** | **289** | **289** | **79** | **58** | **96** | **57** | **60** | **88** | **65** | **77** |
| Ikki afturvendandi [2] | -14 | 72 | -13 | 0 | 0 | 0 | -10 | -6 | 12 | 76 |
| **Úrslit áðrenn virðisjavnan og skatt** | **276** | **361** | **65** | **58** | **96** | **57** | **50** | **81** | **76** | **154** |
| Virðisjavnan [3] | -16 | -38 | -6 | -8 | -10 | 8 | -12 | -3 | -17 | -6 |
| **Úrslit áðrenn skatt** | **260** | **323** | **59** | **50** | **86** | **65** | **38** | **78** | **59** | **148** |
| Rakstrarútreiðslur / rakstrarinntøkur, % | 72 | 72 | 68 | 70 | 73 | 76 | 73 | 69 | 73 | 71 |
| Tal av heiltíðarstarvsfólkum við ársenda | 377 | 393 | 377 | 383 | 390 | 393 | 393 | 385 | 390 | 387 |

1 Samansett av starvsfólkaútreiðslum og umsitingarútreiðslum, og avdráttum, avskrivingum og niðurskrivingum (undantikið umbóking til ikki afturvendandi)

2 Flutt frá rakstrarútreiðslum og frá av- og niðurskrivingum av støðisognum

3 Íroknað inntøkur frá íløguvirksemi

"Vit fegnast um, at vit hava staðið okkum sera væl fíggjarliga í 2019. Vit eru serliga errin av, at vøksturin stóðst av øktum inntøkum, hóast marknaðarstøðan hevur verið avbjóðandi, umframt einari munandi stórari afturføring av burturleggingum. Samtakið heldur sítt lyfti at skapa langtíðar virðir fyri partaeigararnar, og vit eru væl fyri til at taka ímóti krøvunum, sum framtíðin setur," segði Árni Ellefsen, forstjóri í BankNordik

Hetta skrivið brúkar tillagaðu tølini, ið sum heild eru í lutfall til 2018.

## Rakstrarroknskapur

**Rakstrarinntøkur**

Netto rentuinntøkur vóru 367 mió. kr. í 2019 samanborið við 374 mió. kr. í 2018. Minkingin í netto rentuinntøkum var partvíst eitt úrslit av lægri rentumarginali. Netto tænastuinntøkur øktust við 17 mió. kr. frá 172 mió. kr. í 2018 til 189 mió. kr. í 2019 sum heild orsakað av, at realkreditt-tænastur øktust frá 61 mió. kr. í 2018 til 74 mió. kr. í 2019. Aðrar rakstrarinntøkur øktust við 4 mió. kr. til 49 mió. kr. í 2019. Meðan tryggingarinntøkurnar øktust munandi í 2019, stóðu útgjøldini í stað, og úrslitið var, at netto tryggingarinntøkurnar vóru 53 mió.

kr. í 2019 samanborið við 44 mió. kr. í 2018. Samtakið hevði samlaðar rakstrarinntøkur á 658 mió. kr. í 2019, sum er ein vøkstur á 4% samanborið við 2018.

### Rakstrarinntøkur

(DKK 1.000)




### Rakstrarútreiðslur

Rakstrarútreiðslur øktust við 16 mió. kr. til 473 mió. kr. í 2019 úr 456 mió. kr. í 2018, ið sum heild er úrslit av útreiðslu-inflatión og øktum KT-útreiðslum. Bankin hevur tálmað útreiðslur, og útreiðslurnar væntast at minka munandi í 2020, tí tiltøk í 2019, sum skulu fáa útreiðslurnar niður, fara at síggjast aftur í 2020, umframt at samtakið heldur fram við at gera íløgur í rakstrareffektivitet. Mongdin av uppgávum, sum bankin nú megnar at avgreiða sjálvvirkandi, øktist munandi í 2019 samanborið við árið frammanundan, og samtakið heldur fram at leggja dent á at gera enn fleiri fjøltáttaðar og tíðarkrevjandi uppgávur sjálvvirkandi. Hetta fer at byggja eitt sterkt grundarlag undir ætlanunum at røkka okkara framsøkna máli fyri útreiðslu/inntøku-lutfallið í framtíðini.

### Rakstrarútreiðslur

(DKK 1.000)




### Netto niður- og avskrivingar

Samtakið hevur enn einaferð afturført niðurskrivingar, sum eisini er tað, ið sæst aftur í verandi marknaðarstøðu, men sum eisini er úrslit av sunnu kredittgóðskuni av útlánum bankans. Netto niður- og avskrivingar vóru ein afturføring á 105 mió. kr. í 2019 samanborið við eina afturføring á 111 mió. kr. í 2018. Tá hugsað verður um varsemi samtaksins og sterku "loan-to-value" privatkunda-millumverandi, sum eru umleið tveir triðingar av samlaðu útlánum, og at vinnuútlánini einans hava miðal váðar í søguliga váðafullum vinnum, so væntar BankNordik at vera førur fyri at halda seg undir miðal niðurskrivingarprosentinum í fíggjarvinnuni í framtíðini.

### Niður- og avskrivingar

(DKK 1.000)



### Rakstrarúrslit
Rakstrarúrslitið var 289 mió. kr. í 2019, óbroytt síðani 2018.

### Ikki-afturvendandi postar
Ikki-afturvendandi postar vóru eitt hall á 14 mió. kr. í 2019 samanborið við ein nettovinning á 72 mió. kr. í 2018. Útreiðslan i 2019 hevur samband við fráfaringar-avtalur vegna deildartillagingar.

### Virðisjavnan
Virðisjavnan var eitt tap á 16 mió. kr. í 2019 samanborið við eitt tap á 38 mió. kr. í 2018. Hesar virðisjavningar vóru knýttar at rentubroytingunum í danska lánsbræ-vamarknaðinum í 2019.

### Virðisjavnan
(DKK 1.000)




### Úrslit áðrenn skatt
Úrslitið áðrenn skatt var 260 mió. kr. í 2019, sum er ein minking á 64 mió. kr. úr 323 mió. kr. í 2018. Høvuðsorsøkin var 85 mió. kr. í minking í ikki-afturven-dandi postum í mun til 2018. Ikki-afturvendandi postar í 2018 vóru í høvuðsheitum knýttir at søluni og leiguni av høvuðsskrivstovu samtaksins, sum gav eitt yvirskot á 70 mió. kr., og eini øking á 21 mió. kr. í bankans ognar-skapi í BI Holding A/S. Aðrir ikki-afturvendandi postar góvu eitt hall á 19 mió. kr. í 2018.

## Fíggjarstøða

### Útlán
Útlánini vóru 9.909 mió. kr. í 2019 samanborið við 9.956 mió. kr. í 2018. Vinnuútlán øktust við 101 mió. kr., meðan privatútlán minkaðu við 168 mió. kr. Harumframt økti samtakið realkredittlán við 722 mió. kr. í 2019.

### Útlán og realkreditt
(DKK 1.000)




BankNordik leggur stóran dent á at varðveita ein sunnan kredittpolitikk fyri at tryggja, at vøksturin í útlánum ikki fer at gera seg inn á burðadygdina. Tveir triðingar av útlánum eru farnir til privatkundar, meðan hin triðingurin er farin til ein vælspjaddan vinnukundabólk, sum myndin niðanfyri vísir.

### Útlán býtt á bólkar



**Innlán**

Samlaðu innlánini vóru 14.368 mió. kr. við ársenda í 2019, sum er ein øking á 7% úr 13.432 mió. kr. í 2018. Innlán eru hækkað javnt seinnu árini, meðan fyritøkur og húsarhald hava konsoliderað sína fíggjarstøðu.

**Innlán**

(DKK 1.000)




**Solvensur og gjaldføri**

BankNordik hevði ein samlaðan eginpening á 2,397 mió. kr. tann 31. desember í 2019 samanborið við 2.098 mió. kr. tann 31. desember í 2018. Eftirstillaður lánikapitalur var støðugur á 224 mió. kr. Hybridur kjarnukapitalur øktist við 151 mió. kr. í 2019 úr ongum í 2018. Kjarnukapitalur var 2.023 tann 31. desember í 2019, sum var ein øking á 148 mió. kr. úr 1.875 mió. kr. tann 31. desember í 2018.

Solvenstørvur samtaksins minkaði til 9,4% við ársenda í 2019 úr 9,7% við ársenda í 2018. Samlaða kapitalprosentið øktist til 22,3% við ársenda 2019 úr 19,8% við ársenda 2018. Kjarnukapitalprosentið øktist til 20,2% við ársenda 2019 úr 17,7% við ársenda 2018, meðan CET 1 prosentið øktist til 18,8% við ársenda 2019 úr 17,7% við ársenda í 2018. Samlaði kapitalur samtaksins inniheldur 8,8 mió. kr. í undirliggjandi skuld (0,1 prosentstig) sum ikki kunnu takast við í solvensin. Sum so er solvensyvirdekningurin við ársenda 2019 12,8 prosentstig samanborið við 10,0 prosentstig í 2018. BankNordik hevði ein solvensyvirdekning á 7,0 prosentstig samanborið við uttanhýsis kapitalkrøvini íroknað buffarakrøv á tilsamans 15,3% við ársenda 2019.

**Solvensur**




Gjaldførisvísital samtaksins var 252% við ársenda, væl yvir kravið á 100% vegna stóru innlánini. LCR-kravið hinvegin sigur, at gjaldførisbuffari skal vera á í minsta lagi 100%. Við ársenda í 2019 var BankNordik LCR á 230% samanborið við 266% í 2018.

## Fíggjarlig úrslit í fjórða ársfjórðingi (Q4) í 2019

Nettorentuinntøkur í Q4 2019 vóru 95 mió. kr., sum var ein øking úr 90 mió. kr. sum úrslit av hægri rentumarginali í tíðarskeiðinum. Netto tænastuinntøkur vóru 49 mió. kr. í Q4 samanborið við 47 mió. kr. í Q3, meðan tryggingarinntøkur vóru 14 mió. kr. í Q4 samanborið við 15 mió. kr. í undanfarna ársfjórðingi.

Rakstrarútreiðslur vóru 117 mió. kr. í Q4 samanborið við 116 mió. kr. í Q3. Niðurskrivingar vórðu afturførdar fyri 25 mió. kr. í Q4 samanborið við eina afturføring á 9 mió. kr. í Q3.

Úrslitið áðrenn skatt var sostatt 59 mió. kr. í Q4 í 2019 samanborið við eitt yvirskot á 50 mió. kr. í Q3 í 2019.

## Eftirlitsdiamanturin

**Stór millumverandi tilsamans < 175 %**

| 2019 | 2018 |
|---|---|
| 126,5% | 122,2% |

**Útlánsvøkstur < 20 %**

| 2019 | 2018 |
|---|---|
| -0,5% | 4,7% |

**Fíggingarlutfall < 1.0**

| 2019 | 2018 |
|---|---|
| 0,59 | 0,63 |

**Útlán til fastogn < 25%**

| 2019 | 2018 |
|---|---|
| 6,4% | 5,6% |

**Gjaldførisvísital > 100%**

| 2019 | 2018 |
|---|---|
| 252,3% | 266,0% |

# Annað

**Eftirlitsdiamanturin**

Eftirlitsdiamanturin verður nýttur til at máta váðaprofilin hjá einum banka. Eftirlitsdiamanturin hevur fimm økir, sum vísa ábendingar um øktan váða, um farið verður út um mark. Sum myndin vísir, er bankin væl innan fyri øll mørk (stór útlán, fastognarútlán, gjaldføri yvir lógarkravið, fíggingarlutfall og útlánsvøkstur). Mongdin av stórum millumverandi øktist úr 122.2% til 126,5%, væl undir markið á 175%, og øll stór millumverandi eru hágóðsku. Gjaldførisvísitalið var 252% við ársenda samanborið við minstakravið á 100%.

**Afturkeyp av partabrøvum**

Í 2019 keypti samtakið aftur egin partabrøv fyri eitt handilsvirði á 6,9 mió. kr. Í 2019 minkaði samtakið partapeningin við 400.000 partabrøvum, sum vóru afturkeypt av BankNordik. Bankin eigur nú 0,72% av samlaða partapeninginum tann 31. desember í 2019. Bankin hevur ongar ætlanir í næstum, um at afturkeypa fleiri partabrøv, men fylgir regluliga við fyri at staðfesta, um tørvur er á hesum.

**Vinningsbýti**

Á ársaðalfundi samtaksins, sum verður tann 26. mars í 2020, fer nevndin at skjóta upp at rinda eitt vinningsbýti á 67,2 mió. kr. fyri 2019 (7 kr. fyri partabrævið). Í 2019 vóru 70 mió. kr. goldnar út í vinningsbýti fyri fíggjarárið 2018.

Meira fæst at lesa um vinningsbýtispolitikkin á heimasíðu okkara www.banknordik.com/dp

**Komandi broytingar til tillagaða fráboðanarháttin**

Í 2020 fer BankNordik at gera fylgjandi broytingar í tillagaðu uppsetingini av rakstrarroknskapinum:

- Inntøkur frá og útreiðslur í sambandi við íløguognir samtaksins verður sett undir postin inntøkur frá íløguognum heldur enn undir postinum netto rentuinntøkur, aðrar inntøkur og virðisjavnan.

Í framtíðini fer tillagaða úrslitið áðrenn niðurskrivingar ikki at innihalda inntøkur frá íløguognum í samsvari við nýggju mannagongdina. Um hetta verður gjørt fyri rakstrarroknskapin fyri 2019, so minkar úrslit áðrenn niðurskrivingar við 29 mió. kr. úr 185 mió. kr. til 155 mió. kr.

Hesar komandi broytingar til tillagaða rakstrarroknskapin verða innførdar afturvirkandi, og verða hildnar at geva eina meira rættvísandi mynd av kjarnuinntøkum samtaksins.

**Útlit í samsvari við nýggju mannagongdina**

Í 2020 væntar BankNordik at halda fram at økja um síni samlaðu útlán og realkredittlán – bæði til privat- og vinnukundar. Innan fyri privatkundapartin fer samtakið at halda fram við at byggja á framgongdina í undanfarnum árum við at knýta sterkari sambond og styrkja brúkaraupplivingina fyri at draga nýggjar kundar at okkum. Føroysk húsarhald hava søguliga sæð fíggjað síni húsakeyp við vanligum bankaláni, men seinnu árini hevur BankNordik varnast eina líðandi øking í siðbundna danska fíggingarháttinum við 80% í realkredittláni og restini í bankaláni við 2. veðhaldi. Sum væntað, tók hetta dik á seg á føroyska marknaðinum í 2019, tí BankNordik varpaði ljós á henda møguleika í síðst í 2018, umframt at realkredittrentan var lægri enn nakrantíð á sumri í 2019. Vit vænta, at hetta heldur fram í 2020, tí føroyingar kundar gerast alsamt meira varugir við fyrimunirnar við hesum fíggingarháttinum. Í Danmark væntast útlán til privatkundar og realkredittfígging sum heild at vaksa, so hvørt sum BankNordik heldur fram at vinna marknaðarpartar.

Samtakið sær møguleika fyri at økja útlán til vinnukundar í 2020 vegna framhaldandi íløguvirksemi bæði í Føroyum og í Grønlandi. Vinnukundafíggingin hjá BankNordik fer at koma undir trýst frá MREL-krøvunum, sum eru sett í verk, tí vinnuútlán vanliga fáa eina hægri váðavekting enn útlán til privatkundar. Avbjóðingin verður væntandi javnað út við bankans nýtslu av InnovFin og EKF garantium, sum evropeiski íløgugrunnurin og danska útflutnings-kredittráðið veita. Úrslitið av hesum verður, at bankin ikki fer at økja sítt yvirskipaða RWA støði í 2020. Rentumarginalurin væntast framhaldandi at fara at vera undir trýsti í 2020 og at halda fram at trýsta netto rentuinntøkurnar, hóast tað ikki verður líka tungt sum í 2019, tí negativa rentan á innlánum oman fyri eina ávísa upphædd væntast at javna trýstið á útlánsrentuna.

Tænastuinntøkurnar væntast at økjast eitt vet, tí realkredittútlán halda fram at vaksa, og nýggja segmenteringin av kundum bankans fær virknað. BankNordik væntar lægri avlopsvøkstur á íløgurøkt vegna øktan áhuga í passivari íløgustrategium, hóast samlaðu upphæddirnar væntast at økjast eitt vet sum úrslit av negativari rentu á innlánum. Tryggingarinntøkur væntast at økjast, meðan tryggingarútgjøld kunnu sveiggja munandi frá einum ári til næsta. Samtakið hevur hildið sínar rakstrarútreiðslur lutfalsliga í stað síðani 2016 og væntar, at útreiðslurnar fara at minka eitt vet í 2020 samanborið við undanfarin ár. Niðurskrivingar av útlánum væntast at vera lágar í 2020, men bankin væntar ikki at síggja afturføring soleiðis, sum hann hevur í 2018 og 2019.

Av tí at BankNordik hevur skipað sítt virsemi á ein einfaldan og lítið váðafullan hátt, vænta vit at kunna vísa fíggjarliga styrki og burðardyggan vinning við framhaldandi denti á at minka rakstrarútreiðslur og betra um effektivitetin, meðan vit varðveita okkara tænastustøði, sum er fremst á marknaðinum. BankNordik væntar at fáa eitt nettoúrslit millum 100 – 150 mió. kr. í 2020 (2019: 207 mió. kr.).

Hesi útlit kunnu vera óviss, undir hesum niðurskrivingar av útlánum, virðisjavningar og makrobúskaparliga gongdin.

## Nevndarfrágreiðing

# At skapa úrslit í einum skiftandi marknaði

BankNordik megnaði at røkka einum góðum úrsliti í 2019, hóast versnandi umstøður. Vit eru errin av úrslitinum, sum kemur samstundis, sum vit eisini standa okkum betur í kundanøgdsemiskanningum triðja árið á rað. Vit hava gjørt eina røð av ítøkiligum tillagingum í okkara virksemi fyri framtíðina, soleiðis at BankNordik verður betur førur fyri at røkka teimum týðandi krøvunum, sum bæði myndugleikar og eigarar seta í árunum fyri framman.

**At veita bestu tænastuna**

Ein fyritreyt fyri langtíðar viðgongd er, at bankin er førur fyri at møta kundunum og geva teimum enn betri tænastur og ráðgeving. BankNordik hevur varðveitt hetta mál í miðdeplinum í missión samtaksins, sum er at gera tað lætt hjá kundum okkara at taka røttu avgerðina, tá teir skulu taka støðu til, hvussu teirra fíggjarligu áhugamál best verða røkt. Vit leggja okkum eftir at sameina eitt gott innlit í tørvin og hugsanina hjá kundum okkaravið greiðum aftursvari og lættskiljandi samskifti, sama á hvørjum samskiftispalli kundin møtir okkum. Hetta hevur ført til ein bata í kundanøgdseminum ár fyri ár, tá hugsað verður um Net Promoter Score, síðani vit byrjaðu at máta tað fyri trimum árum síðani.

Í 2019 fingu vit nýtt innlit í gongdina í teimum trimum landafrøðiligu økjunum, ið vit virka á, og tað var gott at síggja, at okkara átøk hava havt eina sjónliga ávirkan. Tó eru vit greið yvir, sum vit eisini hava sagt seinnu árini, at átøkini at bøta um kundanøgdsemið, serliga í Danmark, langt frá eru komin á mál. Kortini eru vit fegin um, at kjarnukundar okkara eru nøgdir við ta tænastu, teir fáa, og vit eru eisini fegin um at síggja batar í fatanini av okkara *image* í eini stórari uttanhýsis kanning í Danmark.

**Talgild frambrot og effektivur rakstur**

Eitt innlit, sum vit fingu burtur úr okkara umfatandi kanningum av, hvørja fatan kundarnir hava av bankanum, var, at kundarnir fortaldu okkum, at okkara talgildu pallar framvegis ikki vóru á hædd við marknaðin sum heild. Vit byrjaðu arbeiðið at bøta upp á hesa støðu í 2017, tá ið vit settu í verk eina endurnýggjan av okkara talgildu pallum, sum venda sær móti kundunum. Nýggja heimasíðan kom í 2018 og varð sera væl móttikin av kundunum. Í 2019 stovnaðu vit eina app til barnauppsparingina, sum kann vera við til at hjálpa børnum og ungum at læra um fíggjarligu hugtøkini. Kundar bankans fingu eisini møguleikan at rinda við gjaldskortunum umvegis snildfonir og snild-ur, sum brúka Apple Pay, Google Pay og Fitbit Pay.

2020 verður enn eitt týdningarmikið ár á talgildu leiðini hjá BankNordik, tá bankin væntar at kunna bjóða kundunum ein nýggjan Netbanka. Vit hava samstarvað við talgilda veitaran í menningini av nýggja Netbankanum, og vit fara at vera millum teir fyrstu bankarnar, ið kunnu bjóða nýggja Netbankan. Nýggi talgildi pallurin fer at broyta, hvussu kundar samskifta við bankan. Kundarnir fara at hava munandi størri atgongd til sjálvgreiðsluloysnir, og vit eru eisini í holt við at menna eina persónliga brúkaraflatu.

Í bankanum arbeiða vit framhaldandi við at íverkseta tólmenni og effektivari mannagongdir í størri mun enn áður. Tólmenni kunnu gera tað, sum áður vóru arbeiðskrevjandi uppgávur fyri okkara kundaráðgevar og fyrisitingarligu starvsfólk, og hetta merkir tíðarsparing og færri skeivleikar. Nøgdin av uppgávum, sum bankin kann fremja sjálvvirkandi, øktist munandi í 2019 samanborið við undanfarna ár. Í 2020 ætlar bankin at íverkseta sjálvvirking av virksemi, sum hevur hægri

kompleksitet. Eitt nú verður kundastovnan einfaldari, tá tað verður gjørligt at senda nýggjum kundum sjálvvirkandi persónligar "byrjanarpakkar" við eitt nú kontum, Netbanka og gjaldskortum. Okkara átøk viðvíkjandi sjálvvirking, umframt áhaldandi gongdin at bøta um uppgávur og mannagongdir hjá starvsfólkum bankans eru ein týðandi lutur í grundarlagnum, sum vit fara at byggja okkara framtíðar vinningsføri á.

**Sunn fíggjarstøða hóast vaksandi trýst á rentumarginalin**

BankNordik stóð seg munandi betur í 2019, sum var eitt ár, tá trýstið á rentumarginalin øktist enn meir. Bankin viðurkennir verandi lága rentustøðið sum tað nýggja vanliga umhvørvið, samstundis sum hann virkar í trimum sera kappingarsinnaðum marknaðum, mitt í eini búskaparligari uppgongutíð.

At varðveita góð fíggjarúrslit er tískil eitt avrik, sum BankNordik er errin av. At afturførdar niðurskrivingar sum heild vóru óbroyttar í 2019 samanborið við 2018, vísir greitt, at BankNordik hevur eina sera skynsama samanseting av útlánum. Bankin hevur økt útlán til kundar við umleið 800 mió. kr. tey seinastu trý árini, og hóast vøksturin javnaði út í 2019, so siga tølini ikki alla søguna um tann stóra vøksturin í sethúsalánum (realkreditt); vøksturin var 722 mió. kr. í 2019.

BankNordik hevur eitt greitt mál, sum er at vaksa burðardygt. Kredittvirðið verður gjølla mett, og vit meta, at ein av styrkjunum hjá bankanum er, at vit linka aldrin krøvini í okkara kredittpolitikki, tá vit fara eftir útlánsvøkstri. Satt at siga, so er kredittváðin í samlaðu útlánum bankans bøttur við 30% síðani 2016, tá hann verður máldur sum vigað miðal sannlíkindi av samanløgdu útlánunum.

**Fyrireikingar at møta nýggju kapitalkrøvunum**

Áðrenn Fíggjareftirlitið fráboðaði endaligu MREL krøvini fyri BankNordik, kannaði bankin umstøðurnar í 2019 við at útgeva meira Tier 1 kapital. Tað var nøktandi at síggja, at útgávan hevði sera stóran áhuga millum íleggjarar, og vit tryggjaðu okkum boð fyri eina upphædd á 150 mió. kr. á 4,5%, væl undir støðið hjá sambæriligum donskum bankum. Somuleiðis fara vit áhaldandi at halda fram at tillaga kapiltalstrukturin hjá samtakinum fyri at optimera virðini hjá partaeigarunum innan fyri komandi rammurnar fyri kapitalkrøv.

Havast skal í huga, at alsamt vaksandi kapitalkrøvini í roynd og veru avmarka nøgdina av verkætlanum, sum kunnu fíggjast, og sum eru nóg áhugaverd, at tey kunnu skapa virði fyri okkara partaeigarar. Tískil kann væntast, at átøk at økja útlán í framtíðini eru minni sannlík at verða virðisøkjandi. Vit halda, at enn størri dentur skal leggjast á effektiva kapitalplasering, sum fer at skapa størri virðir fyri okkara partaeigarar heldur enn einans at hugsa um inntøkuvøkstur. Sum liður í hesum ætla vit at styrkja okkara samstarv við evropeiska íløgugrunnin, Innovfin, umframt danska Eksport Kredit Fonden komandi árið. Hetta fer at avmarka vøksturin í okkara váða-vektaðu ognum og bøta um okkara váðajavnaða avkast á vinnulánum, har váða-vektaðar ognir vanliga eru hægri enn í privatlánum.

**Styrkt strategiskt fokus**

Avgerðin hjá bankanum at styrkja strategiskt fokus og at tryggja lønsemið í framtíðini fevndi um fýra ymisk øki. Okkara deildarnet í Danmark varð konsoliderað, okkara Private Banking tænastur verða ikki bjóðaðar til nýggjar kundar, segmenteringin og kostnaðurin av okkara fyrimunaskipan verða tillagað, og negativ renta verður løgd á innlán, sum eru hægri enn ein ávís upphædd. Hetta var ikki ein løtt avgerð at taka, tí vit eru fullgreið yvir, at bankin er í vanda fyri at fáa negativa almennu umrøðu. Tó meta vit, at tað er alneyðugt at hava eina burðardygga virkisætlan, og serliga avgerðin um at áleggja negativa rentu er alneyðug fyri at fáa rentumarginalin á rætt, tá tikið verður ímóti innlánum.

Vit halda, at vit hava funnið røttu javnvágina, tá hugsað verður um at bøta um lønsemið uttan at seta kappingarførið í váða. Sum áður nevnt, so væntast tiltøkini at bøta um rakstrarúrslit samtaksins við 40 mió. kr. árliga, og tað mesta av hesum fer at koma í 2020. BankNordik hevur mett tað vera neyðugt at fremja hesa truplu - men tó ábyrgdarfullu – avgerð, nú marknaðurin gerst alsamt meira avbjóðandi.

**Dagføra fíggjarligu málini**

Umhvørvið, sum BankNordik rekur sítt virksemi í, er broytt upp á fleiri týðandi hættir síðani bankin setti sítt verandi fíggjarliga mál, útreiðslu/inntøku-støði og kapitallutfall í 2016. Lága rentustøðið umframt fráboðaða minstakravið fyri eginpening og niðurskrivingsegnaðar skuldir (MREL) fyri BankNordik merkir, at okkara farnu mál ikki longur lýsa støðu bankans nøktandi.

Sum ein natúrlig avleiðing av broytta uttanhýsis umhvørvinum og lógarkrøvunum, fráboðar bankin eitt nýtt mál fyri kapitalstøði, tá ið MREL ískoytið er fult tikið við í byrjanini av 2025. Málsetningurin um samlaða kapitalstøðið, við MREL, í 2024 er javnað til 32,1%. Umleið 30% av hesum kapitali væntast at vera Tier 3 kapitalur, sum er útgivin til at dekka tað mesta av MREL ískoytinum. CET 1 lutfallið, sum miðað verður ímóti, verður javnað frá 17% til 18,5%, og solvensurin, sum miðað verður eftir uttan MREL, er javnaður frá 20% til 22%.

Umframt nýggju kapitalmálini tillagar bankin málsetningin um útreiðslu/inntøku lutfall frá 65% til 67% og sítt eginkapital forrentningsmál frá 10% til 6-8%. Málini eru sostatt framhaldandi framsøkin, tá hugsað verður um tær umstøður, sum bankin virkar undir.

**Skapa virði fyri partaeigararnar**

Bankin tók nøkur strategisk stig í 2019 at fáa ein meira fokuseraðan fíggjarstovn, og nú herðir BankNordik síni átøk í 2020 til tess at styrkja sambondini við kundarnar, at gera kundaupplivingina í bankanum einfaldari, at tálma útreiðslurnar og at styrkja rakstrareffektivitetin. Framgongdin á øllum hesum økjum í árunum, sum koma, fer at økja um burðardyggu fíggjarstøðu bankans, eisini tá virkishjólini byrja at snara øvuta vegin.

Hetta gera vit í samsvari við okkara ynski og mál um at hava eina jaliga ávirkan á kundar okkara, nærsamfeløgini, sum vit virka í, og umhvørvið, sum vit liva í. Við sínum djúpu rótum í nærsamfelagnum, hevur BankNordik spælt ein týðandi leiklut í føroyska samfelagnum í meira enn eina øld. Í dag standa vit framman fyri nýggjum heimsumfatandi avbjóðingum, hvørs avleiðingar fara at ávirka okkum øll. Av hesi orsøk eru vit farin saman við stjórnum, felagsskapum og einstaklingum at stríðast ímóti nøkrum av heimsins mest torførum spurningum við at stuðla heimsmálunum hjá ST, og vit leggja okkara orku og førleikar í málini nr. 4, 5, 8, 11 og 13. Á hesum økjum fer bankin at stuðla átøkum innan haldføri og at stríðast ímóti veðurlagsbroytingum, stuðla undi búskaparvøkstur, javnrættindi millum kynini og útbúgving.

Tað áræði og framsøkni, sum eru neyðug fyri at skapa virði fyri allar okkara partaeigarar kann einans førast út í lívið umvegis ótroyttiliga arbeiðið hjá einum arbeiðsliði, sum stendur saman um uppgávuna og hevur felags virðir og góðar førleikar. Vit vita, at okkum vantar ikki dugnasemi og eldhuga í BankNordik, og vit gleða okkum til enn eitt ár við framgongd, har vit fara at brúka hesar førleikar til fyrimuns fyri okkara partaeigarar, kundar og samfeløgini, sum vit virka í.

## Umhvørvið rundan um okkum

Makroøkonomiska umhvørvið hevur eina sera týðandi ávirkan á einhvønn fíggjarstovn. Fyri ein vanligan privatkunda- og vinnukundabanka sum BankNordik, hevur búskaparliga ringrásin, umframt útlánseftirspurningurin, ávirkan á kredittvirðið hjá kundunum og teirra førleika at endurrinda, umframt á virðið á veðnum, sum bankin hevur.

Bankin er staðsettur í trimum samantvinnaðum búskapum, og kortini eru teir somikið ymiskir, tá hugsað verður um teirra vakstrarmynstur. Leiðslan og nevndin í BankNordik viðgera teir allar fyri at meta um, hvar møguleikar liggja, og hvar váðar kunnu vísa seg.

Bankin viðurkennir tørvin at hava eyguni eftir verandi uppsveiggi og skilir, at tað hevur vart longri enn undanfarnu sveiggj, og at avgerðir mugu takast fyri at taka hædd fyri møguleikanum fyri brádligari og óvæntaðari afturgongd.

Kortini er tað so, at aftan fyri søgurnar um vøkstur í búskapunum, sum BankNordik virkar í, eru nøkur viðurskifti, sum eru verd at nevna. Fyrst og fremst, er altjóða áhugin fyri norðuratlantshavinum og serliga arktis. Grønland er í miðdeplinum í einum stríði millum Russland, Kina og USA, sum øll vilja hava ávirkan á arktiska økið. Áhugin umboðar nakrar týðandi møguleikar,

men dynamikkurin kann eisini føra til óvæntaðar avleiðingar, so sum tá danska stjórnin legði ímillum, tá kinesarar vildu fíggja flogvallir í Grønlandi, ella tá forsetin í USA spurdi bart út, um hann kundi keypa landið.

Hóttanin frá netbrotsverkum er sera stór í flestu londunum í vesturheiminum, og tað er gerandisdagur í Danmark, Føroyum og Grønlandi. Ávirkanin sum ein hending hevur, kann vera stór, sum vit sóu, tá donsk feløg mistu pengar sum úrslit av netálopum, og tá Føroyar akkurát hóraðu undan, tá allar heimasíður mundu farið í svart seint í 2018, tá álop var á FO-umsitingina.

Hetta nýggja slagið av váða saman við øðrum atknýttum váðum, so sum ávirkanin av veðurlagsbroytingum á fíggjarliga støðufestið, førir til eitt nýtt slag av "váðahugsan" fyri bankar og tey fólkini, sum reka teir. Tað er neyðugt at leggja upp fyri øllum sløgum av váðum í sambandi við heildarmetingina av váðanum í einum peningastovni. Eisini er neyðugt at kanna, hvussu ymisku váðarnir, sum hótta peningastovnar, kunnu hugsast at vera samantvinnaðir.

Føroyski búskapurin hevur upplivað eina tiltrongda spjaðing hetta seinasta áratíggju. Botnfiskavinnan, sum føroyska samfelagið nærum einans dúvaði upp á fyrr, er nú ein út av trimum sera týðandi vinnum. Enn meira týðandi enn botnfiskavinnan, tá hugsað verður um útflutning, eru pelagiski fiskiskapurin og alivinnan. Hesar tvær vinnur hava verið høvuðsmotorarnir í búskaparvøkstrinum seinastu tíggju árini og hava lyft føroyska BTÚ'ið upp á støði við grannalondini í norðurlondum. Ein vinna, sum leggur aftrat ymiskleikanum er ferðavinnan, sum er vaksin við tveysiffraðum prosenttølum í nógv ár nú, og hon er skjótt eitt sera týðandi ískoyti fyri búskapin sum heild. 2020 verður eitt avgerandi ár fyri vinnuna, tí gistingarhúskapasiteturin í Havn veksur við tveimum nýggjum gistingarhúsum og eini munandi útbygging av einum triðja gistingarhúsi.

Eitt sum er umráðandi fyri fíggjarvinnuna, er, at samlaðu útlán í Føroyum eru økt tey seinastu trý árini. Vøkstur í farna ári var beint undir 4%, sum var merkt av inflatión í sethúsaprísum, stórari tilflyting og sunnum íløgum hjá føroyskum fyritøkum. Bankin væntar, at útlánsvøksturin fer at halda fram í 2020, partvíst sum úrslit av øktum íløgum í nýggjum fiskiskipum, eftir at ein nýggj fiskivinnulóg kom í gildi í byrjanini av 2020.

Danski búskaparvøksturin hesi seinastu árini kann sigast at hava verið í javnvág. Búskapurin er vaksin árliga við beint yvir 2% frá 2015-2018 og tykist at hava megnað at staðið ímóti niðurgongdini hjá mongu av størstu samstarvsfeløgunum hjá Danmark í 2018-2019. Búskapurin er vaksin sum úrslit av eini tilgongd í arbeiðsmegi og ikki kredittvøkstri. Bankaútlán eru minkað hvørt ár síðani 2014, og tey fullu við næstan 4% í 12 mánaðir til november 2019. Realkredittfígging, harafturímóti, vaks við somu prosentum í 2019. BankNordik hevur lagt seg eftir at fáa útlánsvøkstur í danska virkisøki sínum við tveimum prosentstigum omanfyri marknaðarvøksturin, og hetta mál helt í 2019.

Grønlendski búskapurin hevur upplivað ein høgan og tó viðbreknan búskaparvøkstur síðani 2014. Búskapurin er sera bundin at fiskivinnuni, og sostatt er tað fiskiskapurin og fiskaprísurin, sum hevur staðið fyri vøkstrinum, sum væntast at halda fram inn í 2020. Vøksturin í 2020 fær uppaftur meira ferð, tá byrjað verður uppá tríggjar verkætlanir at útbyggja flogvallir, sum fer at leggja meira trýst á arbeiðsmarknaðin. Búskaparstøðan sum heild er øðrvísi enn í øðrum vesturlendskum londum, tí almenna skuldin er á sera lágum støði. Og meðan búskapurin er viðbrekin, tí hann dúvar upp á eina einstaka stóra vinnu, so hevur stóra árliga ríkisveitingin úr Danmark eina javnandi ávirkan. Grønland vónar, at ferðavinnan og mineralnámsvinna eru tvær vinnur, sum kunnu stuðla búskapinum í framtíðini. Virksemið í námsvinnuni er framhaldandi á einum sera lágum støði, men ferðavinnan hevur sæð hampiligan vøkstur síðani 2014. Vónað verður, at rættuligt dik kemur á vøksturin, tá flogvallarútbyggingarnar eru lidnar, hóast avbjóðingar enn eru, tá hugsað verður um avmarkaða arbeiðsmarknaðin og samskipaða útbygging av ferðavinnuútboðnum, sum kann nøkta møguligt øktan eftirspurning. Útlánsvøkstur til privatkundar var lítil í 2019, men útlán til vinnukundar vaks við 13% í mánaðunum fram til september í 2019. Í tíðarskeiðinum vann BankNordik marknaðarpartar í vinnukundaøkinum, og vinnuútlán vuksu við 30%. Bankin heldur framhaldandi at virksemið í Grønlandi er áhugavert, og bankin er grundfestur sum eitt heildarveitandi alternativ til grønlendska kappingarneytan.

# Bankavirksemi tilsamans

**Rakstrarroknskapur, Bankavirksemi**

| DKKm | 2019 | 2018 | Q4 2019 | Q3 2019 | Q2 2019 | Q1 2019 | Q4 2018 | Q3 2018 | Q2 2018 | Q1 2018 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Rentuinntøkur, netto | 365 | 373 | 94 | 90 | 90 | 91 | 92 | 94 | 93 | 94 |
| Ómaksgjøld og tænastuinntøkur, netto | 200 | 182 | 52 | 50 | 48 | 51 | 45 | 45 | 45 | 46 |
| Aðrar rakstrarinntøkur | 43 | 39 | 13 | 11 | 10 | 10 | 8 | 8 | 13 | 10 |
| **Rakstrarinntøkur** | **609** | **594** | **159** | **151** | **148** | **151** | **145** | **147** | **152** | **150** |
| Rakstrarútreiðslur | -449 | -435 | -110 | -111 | -113 | -116 | -109 | -106 | -110 | -110 |
| Sektorútreiðslur | -1 | -1 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **Úrslit áðrenn niðurskrivingar** | **159** | **159** | **49** | **41** | **34** | **35** | **35** | **42** | **42** | **40** |
| Niðurskrivingar, netto | 105 | 111 | 25 | 9 | 53 | 19 | 18 | 39 | 23 | 31 |
| **Rakstrarúrslit** | **263** | **269** | **73** | **49** | **87** | **54** | **54** | **81** | **65** | **71** |
| Ikki afturvendandi | -14 | 72 | -13 | 0 | 0 | 0 | -10 | -6 | 12 | 76 |
| **Úrslit áðrenn virðisjavnan og skatt** | **250** | **341** | **60** | **49** | **87** | **54** | **44** | **75** | **76** | **147** |
| Virðisjavnan | -14 | -36 | -5 | -7 | -9 | 8 | -11 | -3 | -17 | -5 |
| **Úrslit áðrenn skatt** | **236** | **306** | **55** | **42** | **78** | **62** | **32** | **72** | **59** | **142** |
| Útlán | 9.909 | 9.956 | 9.909 | 9.983 | 10.053 | 10.006 | 9.956 | 10.008 | 9.742 | 9.607 |
| Innlán og onnur skuld | 14.399 | 13.452 | 14.399 | 13.557 | 14.156 | 14.027 | 13.452 | 13.184 | 13.168 | 13.107 |
| Realkreditlán | 12.960 | 12.238 | 12.960 | 12.918 | 12.644 | 12.477 | 12.238 | 12.050 | 11.890 | 11.852 |
| Rakstrarútreiðslur / rakstrarinntøkur, % | 74 | 73 | 69 | 73 | 77 | 77 | 75 | 72 | 72 | 73 |
| Tal av heiltíðarstarvsfólkum við ársenda | 345 | 360 | 345 | 354 | 358 | 359 | 360 | 355 | 358 | 356 |

# Bankavirksemi – Privat

**Rakstrarroknskapur, Privat**

| DKKm | 2019 | 2018 | Q4 2019 | Q3 2019 | Q2 2019 | Q1 2019 | Q4 2018 | Q3 2018 | Q2 2018 | Q1 2018 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Rentuinntøkur, netto | 242 | 258 | 61 | 60 | 60 | 61 | 63 | 65 | 65 | 66 |
| Ómaksgjøld og tænastuinntøkur, netto | 184 | 169 | 48 | 46 | 44 | 46 | 44 | 41 | 41 | 43 |
| Aðrar rakstrarinntøkur | 33 | 31 | 8 | 8 | 8 | 8 | 7 | 5 | 11 | 8 |
| **Rakstrarinntøkur** | **458** | **459** | **117** | **114** | **112** | **116** | **114** | **111** | **117** | **116** |
| Rakstrarútreiðslur | -169 | -176 | -38 | -42 | -45 | -43 | -43 | -44 | -44 | -45 |
| Sektorútreiðslur | -1 | -1 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **Úrslit áðrenn niðurskrivingar** | **289** | **282** | **78** | **71** | **67** | **73** | **70** | **67** | **73** | **71** |
| Niðurskrivingar, netto | 45 | 54 | 13 | 2 | 26 | 4 | 8 | 22 | 10 | 15 |
| **Rakstrarúrslit** | **334** | **336** | **91** | **74** | **92** | **77** | **78** | **89** | **83** | **86** |
| Ikki afturvendandi | -9 | 0 | -9 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **Úrslit áðrenn virðisjavnan og skatt** | **325** | **336** | **82** | **74** | **92** | **77** | **78** | **89** | **83** | **86** |
| **Úrslit áðrenn skatt** | **325** | **336** | **82** | **74** | **92** | **77** | **78** | **89** | **83** | **86** |
| Útlán | 6.287 | 6.455 | 6.287 | 6.402 | 6.451 | 6.429 | 6.455 | 6.481 | 6.382 | 6.368 |
| Innlán og onnur skuld | 10.603 | 10.096 | 10.603 | 10.523 | 10.639 | 10.304 | 10.096 | 9.928 | 10.027 | 9.804 |
| Realkreditlán | 12.751 | 11.838 | 12.751 | 12.546 | 12.280 | 12.093 | 11.838 | 11.625 | 11.460 | 11.406 |
| Rakstrarútreiðslur / rakstrarinntøkur, % | 37 | 38 | 33 | 37 | 40 | 37 | 38 | 40 | 38 | 38 |
| Tal av heiltíðarstarvsfólkum við ársenda | 202 | 208 | 202 | 213 | 212 | 200 | 208 | 206 | 201 | 207 |

# Bankavirksemi – Vinna

Rakstrarroknskapur, Vinna

| DKKm | 2019 | 2018 | Q4 2019 | Q3 2019 | Q2 2019 | Q1 2019 | Q4 2018 | Q3 2018 | Q2 2018 | Q1 2018 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Rentuinntøkur, netto | 119 | 113 | 31 | 30 | 29 | 29 | 27 | 29 | 29 | 28 |
| Ómaksgjøld og tænastuinntøkur, netto | 17 | 14 | 4 | 4 | 4 | 4 | 4 | 3 | 3 | 3 |
| Aðrar rakstrarinntøkur | 6 | 6 | 2 | 1 | 1 | 1 | 1 | 2 | 1 | 3 |
| **Rakstrarinntøkur** | **141** | **133** | **37** | **35** | **34** | **35** | **32** | **34** | **34** | **33** |
| Rakstrarútreiðslur | -14 | -15 | -4 | -4 | -3 | -3 | -4 | -4 | -4 | -4 |
| **Úrslit áðrenn niðurskrivingar** | **127** | **118** | **33** | **31** | **31** | **31** | **29** | **30** | **30** | **29** |
| Niðurskrivingar, netto | 59 | 57 | 22 | 4 | 24 | 11 | 10 | 17 | 13 | 16 |
| **Rakstrarúrslit** | **186** | **174** | **55** | **35** | **54** | **42** | **39** | **47** | **43** | **45** |
| **Úrslit áðrenn virðisjavnan og skatt** | **186** | **174** | **55** | **35** | **54** | **42** | **39** | **47** | **43** | **45** |
| **Úrslit áðrenn skatt** | **186** | **174** | **55** | **35** | **54** | **42** | **39** | **47** | **43** | **45** |
| Útlán | 3.602 | 3.502 | 3.602 | 3.534 | 3.573 | 3.565 | 3.502 | 3.527 | 3.360 | 3.240 |
| Innlán og onnur skuld | 3.770 | 3.356 | 3.770 | 3.018 | 3.498 | 3.715 | 3.356 | 3.257 | 3.141 | 3.303 |
| Realkreditlán | 209 | 400 | 209 | 372 | 364 | 384 | 400 | 425 | 430 | 446 |
| Rakstrarútreiðslur / rakstrarinntøkur, % | 10 | 11 | 10 | 11 | 10 | 10 | 11 | 12 | 11 | 12 |
| Tal av heiltíðarstarvsfólkum við ársenda | 16 | 16 | 16 | 16 | 16 | 16 | 16 | 17 | 17 | 18 |

# Tryggingarvirksemi

Rakstrarroknskapur, Trygd

| DKKm | 2019 | 2018 | Q4 2019 | Q3 2019 | Q2 2019 | Q1 2019 | Q4 2018 | Q3 2018 | Q2 2018 | Q1 2018 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Tryggingargjøld, netto | 113 | 105 | 28 | 29 | 28 | 27 | 27 | 27 | 26 | 25 |
| Skaðagjøld, netto | -69 | -72 | -17 | -17 | -15 | -19 | -17 | -17 | -23 | -15 |
| **Inntøkur frá tryggingarvirksemi, netto** | **44** | **33** | **11** | **12** | **13** | **8** | **10** | **10** | **3** | **11** |
| Inntøkur frá íløguvirksemi | -1 | -1 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **Rakstrarinntøkur** | **43** | **32** | **11** | **11** | **13** | **8** | **10** | **9** | **3** | **11** |
| Rakstrarútreiðslur | -25 | -24 | -7 | -6 | -7 | -6 | -6 | -6 | -6 | -6 |
| **Úrslit áðrenn skatt** | **18** | **8** | **4** | **6** | **6** | **2** | **4** | **3** | **-4** | **5** |
| Combined ratio | 85 | 92 | 85 | 80 | 78 | 93 | 85 | 87 | 114 | 80 |
| Bruttoendurgjaldsprosent | 61 | 69 | 60 | 60 | 54 | 72 | 63 | 64 | 90 | 58 |
| Tal av heiltíðarstarvsfólkum við ársenda | 25 | 25 | 25 | 22 | 24 | 26 | 25 | 23 | 25 | 25 |

# Annað virksemi

## Skyn

Sum úrslit av lágu rentuni, búskaparvøkstri og fólkatilflytingini, hevur føroyski bústaðamarknaðurin upplivað sera nógv virksemi seinastu árini, og nú er tað størri enn nakrantíð. Húsaprísurin hækkar, og húsasølurnar eru alsamt vaksandi. Sethúsameklarafyritøkan hjá BankNordik, Skyn, hevur staðið seg væl í hesum tíðarskeiði og hevur staðið fyri 240 sølum í 2019 samanborið við 234 í 2018. Inntøkurnar hjá Skyn vóru 7,9 mió. kr. samanborið 7,5 mió. kr. í 2018, meðan úrslit áðrenn skatt var 1,6 mió. kr. samanborið við 2,5 mió. kr. í 2018. Eftir ætlan fer Skyn at rinda BankNordik vinningsbýti á 1,3 mió. kr. fyri fíggjarárið 2019.

## NordikLív

NordikLív er eitt lívstryggingarfelag, sum varð stovnað í 2015. BankNordik eigur allan partapeningin. Felagið byrjaði sítt virksemi í 2016 við at bjóða vanligar lívstryggingar, avlamistryggingar, og tryggingar við álvarsamari sjúku á føroyska marknaðinum. Í 2019 vóru tryggingarinntøkurnar 15 mió. kr. samanborið við 14 mió. kr. í 2018, meðan úrslit áðrenn skatt var 4 mió. kr. í 2019 samanborið við 7 mió. kr. í 2018.

Eftir ætlan fer NordikLív at rinda BankNordik eitt vinningsbýti á 3 mió. kr. fyri fíggjarárið 2019.

# Partaeigarar

## BankNordik-partabrævið

Endakursurin á BankNordik-partabrævinum á Nasdaq Copenhagen tann 31. desember í 2019 var 109 samanborið við endakurs á 108,5 tann 31. desember í 2018. Hetta er ein øking á 0,5% samanborið við Copenhagen Bank vísital. Handilin við BankNordik partabrævinum var 191 mió. kr. í 2019 samanborið við 104 mió. kr. í 2018.

Gongdin í BankNordik partabrævinum mótvegis Copenhagen Bank vísital á Nasdaq 2019:

**BankNordik-partabrævið mótvegis Copenhagen Bank vísital**




## Partaeigarabygnaður

Tá hendan ársfrágreiðing fyri 2019 varð givin út, høvdu hesir partaeigarar fráboðað viðkomandi myndugleikum, at teir áttu meira enn 5% av partabrøvunum í bankanum:

- Fíggingargrunnurin frá 1992 (Føroya landsstýri), Tórshavn, eigur 35% av partabrøvunum.
- Lind Invest, Aarhus, eigur 12% av partabrøvunum.
- Protector Forsikring ASA, Oslo, eigur 7% av partabrøvunum.
- P/F Tjaldur, Tórshavn, eigur 5% av partabrøvunum.
- Sp/f Framherji, Fuglafjørður, eigur 5% av partabrøvunum.

Tann 31. desember í 2019 hevði BankNordik áleið 8.200 partaeigarar. Føroya landsstýri eigur 35% av partapenginum, stovnsligir og aðrir stórir íleggjarar eiga 48%, privatir íleggjarar eiga 16%, meðan bankin sjálvur eigur 1%. Flestu av partaeigarunum búgva í Føroyum.

| **Land** | Prosent av áljóðandi partabrævaogn |
|---|---|
| Føroyar | 58,7 |
| Danmark | 21,8 |
| Norra | 6,9 |
| Onnur | 12,7 |
| **Tilsamans** | **100** |

Nevndin hevur givið bankanum heimild at keypa upp í 10% av egnum partabrøvum í tíðarskeiðinum fram til 1. mars í 2024.

Investor relations-politikkur bankans kann lesast á heimasíðuni hjá BankNordik: www.banknordik.com/ir

# Rakstrarroknskapur - BankNordik

| Note | DKK 1.000 | Samtak | | BankNordik | |
|---|---|---|---|---|---|
| | | **2019** | **2018** | **2019** | **2018** |
| | Rentuinntøkur | 393.388 | 393.429 | 391.691 | 391.982 |
| | *- harav inntøkur frá innlánum* | *9.820* | *5.165* | *9.820* | *5.165* |
| | Rentuútreiðslur | 26.697 | 19.287 | 26.666 | 19.288 |
| | *- harav útreiðslur av aktivum* | *4.674* | *0* | *4.674* | *0* |
| | **Rentuinntøkur, netto** | **366.691** | **374.143** | **365.024** | **372.694** |
| | Vinningsbýti av partabrøvum o.ø. | 13.984 | 11.396 | 13.984 | 11.396 |
| | Ómaksgjøld og tænastuinntøkur | 202.683 | 185.071 | 213.570 | 195.067 |
| | Útreiðslur til ómaksgjøld og tænastur | 13.208 | 12.858 | 13.208 | 12.858 |
| | **Vinningsbýti, ómaksgjøld og tænastuinntøkur, netto** | **203.458** | **183.609** | **214.346** | **193.605** |
| | **Rentuinntøkur og ómaksgjøld, netto** | **570.149** | **557.752** | **579.370** | **566.299** |
| | Tryggingargjøld, netto | 126.504 | 118.148 | | |
| | Skaðagjøld, netto | 74.177 | 74.397 | | |
| | **Rentuinntøkur, ómaksgjøld og inntøkur frá tryggingarvirksemi, netto** | **622.476** | **601.503** | **579.370** | **566.299** |
| | Virðisjavnan | 4.395 | 7.113 | 6.943 | 9.531 |
| | Aðrar rakstrarinntøkur | 14.497 | 19.947 | 8.707 | 13.940 |
| | Útreiðslur til starvsfólk og fyrisiting | 470.980 | 459.247 | 448.613 | 438.578 |
| | Av- og niðurskrivingar av ítøkiligum ognum | 14.923 | -43.807 | 14.404 | -44.379 |
| | Aðrar rakstrarútreiðslur | 901 | 793 | 901 | 793 |
| | Niðurskrivingar av útlánum og aðrari ogn v.m. | -104.928 | -110.782 | -104.928 | -110.782 |
| | Inntøka frá íløgum sambært innanvirðisháttinum | 283 | 184 | 19.501 | 14.565 |
| | **Úrslit áðrenn skatt** | **259.775** | **323.295** | **255.531** | **320.125** |
| | Skattur | 53.144 | 61.199 | 48.900 | 58.029 |
| | **Ársúrslit frá framhaldandi virksemi** | **206.631** | **262.097** | **206.631** | **262.097** |
| | Býti av ársúrsliti | | | | |
| | Partaeigarar í BankNordik | 206.631 | 262.097 | 206.631 | 262.097 |
| | **Ársúrslit** | **206.631** | **262.097** | **206.631** | **262.097** |
| | Grundleggjandi úrslit fyri hvørt partabrævið, íalt, DKK* | 21,78 | 27,11 | 21,78 | 27,11 |
| | Útjavnað úrslit fyri hvørt partabrævið, íalt, DKK* | 21,78 | 27,11 | 21,78 | 27,11 |

*Grundað á miðaltal av partabrøvum, sí útgreining av bankans eginogn

# Konsolideraðar heildarinntøkur - BankNordik

| DKK 1.000 | Samtak | | BankNordik | |
|---|---|---|---|---|
| | **2019** | **2018** | **2019** | **2018** |
| Ársúrslit | 206.631 | 262.097 | 206.631 | 262.097 |
| Aðrar heildarinntøkur ið ikki eftirfylgjandi verða umflokkaðar til rakstrarroknskapin: | | | | |
| Uppskrivingar av deildarbygningum | -1.735 | 13.718 | -1.735 | 13.718 |
| Skattur av heildarinntøkum | 660 | -2.749 | 660 | -2.749 |
| Uppskrivingar av ognum, dóttirfeløg | 615 | 0 | 615 | 0 |
| Aðrar heildarinntøkur í alt | -460 | 10.968 | -460 | 10.968 |
| **Samlaðar konsolideraðar heildarinntøkur** | **206.171** | **273.065** | **206.171** | **273.065** |
| | | | | |
| **Býti av heildarinntøkunum** | | | | |
| Partaeigarar í BankNordik P/F | 204.432 | 273.065 | 204.432 | 273.065 |
| Eigarar av hybridum kjarnukapitali | 1.739 | 0 | 1.739 | 0 |
| **Samlaðar konsolideraðar heildarinntøkur** | **206.171** | **273.065** | **206.171** | **273.065** |

# Fíggjarstøða - BankNordik

| Note | DKK 1.000 | Samtak | | BankNordik | |
|---|---|---|---|---|---|
| | | **31. des. 2019** | **31. des. 2018** | **31. des. 2019** | **31. des. 2018** |
| | **Ogn** | | | | |
| | Kassapeningur og áogn uttan uppsøgn í tjóðbankanum | 252.059 | 180.051 | 252.000 | 179.956 |
| | Áogn í lánistovnum og tjóðbankum | 877.825 | 914.420 | 877.825 | 914.420 |
| | Útán til dagsvirði | 509.864 | 519.638 | 509.864 | 519.638 |
| | Útlán til amortiseraðan kostprís | 9.399.022 | 9.436.840 | 9.399.022 | 9.436.840 |
| | Lánsbrøv til dagsvirði | 5.599.529 | 4.565.087 | 5.404.445 | 4.374.064 |
| | Partabrøv v.m. | 312.175 | 304.003 | 312.175 | 304.003 |
| | Ogn knýtt at tryggingarsáttmálum | 6.176 | 5.847 | 0 | 0 |
| | Kapitalpartar í assosieraðum fyritøkum | 6.369 | 6.082 | 6.369 | 6.082 |
| | Kapitalpartar í tilknýttum fyritøkum | 0 | 0 | 133.438 | 118.641 |
| | Ognir í puljuavtalum | 795.822 | 445.241 | 795.822 | 445.241 |
| | Óítøkiligar ognir | 9.957 | 6.678 | 9.957 | 6.678 |
| | Grundøki og bygningar í alt | 212.559 | 98.649 | 209.886 | 96.705 |
| | Deildarbygningar | 212.559 | 98.649 | 209.886 | 96.705 |
| | Onnur ítøkilig ogn | 19.985 | 23.814 | 19.060 | 22.760 |
| | Verandi skattaogn | 10.705 | 6.814 | 10.705 | 6.814 |
| | Útskotin skattaogn | 5.008 | 19.641 | 4.960 | 18.496 |
| | Ognir til sølu | 1.500 | 20.364 | 1.500 | 20.364 |
| | Aðrar ognir | 87.188 | 80.194 | 81.669 | 73.361 |
| | Tíðarskeiðsavmarkingar | 67.657 | 70.194 | 66.584 | 68.629 |
| | **Ogn tilsamans** | **18.173.399** | **16.703.555** | **18.095.281** | **16.612.691** |

# Fíggjarstøða - BankNordik samtakið

| Note | DKK 1.000 | Samtak | | BankNordik | |
|---|---|---|---|---|---|
| | | 31. des. 2019 | 31. des. 2018 | 31. des. 2019 | 31. des. 2018 |
| | **Eginpeningur og skuld** | | | | |
| | **Skuld uttan avsetingar** | | | | |
| | Skuld til lánistovnar og tjóðbankar | 54.922 | 298.610 | 54.922 | 298.610 |
| | Innlán og onnur skuld | 14.367.685 | 13.432.228 | 14.399.292 | 13.452.242 |
| | Puljuinnlán | 795.832 | 445.572 | 795.832 | 445.572 |
| | Skuld knýtt at tryggingarsáttmálum | 92.922 | 96.261 | 0 | 0 |
| | Skyldugur skattur | 36.107 | 17.441 | 32.828 | 14.394 |
| | Onnur skuld | 309.825 | 170.920 | 297.822 | 160.240 |
| | Tíðaravmarkingar | 5.471 | 4.499 | 3.951 | 3.609 |
| | **Samlað skuld uttan avsetingar** | **15.662.763** | **14.465.532** | **15.584.648** | **14.374.667** |
| | **Avsettar skyldur** | | | | |
| | Avsetingar fyri ábyrgdir | 18.446 | 27.443 | 18.446 | 27.443 |
| | Aðar avsetingar | 5.012 | 5.361 | 5.012 | 5.361 |
| | **Avsettar skyldur í alt** | **23.461** | **32.805** | **23.459** | **32.805** |
| | **Eftirstillað kapitalinnskot** | | | | |
| | Eftirstilla kapitalinnskot | 224.086 | 223.477 | 224.086 | 223.477 |
| | **Skuld tilsamans** | **15.910.311** | **14.721.814** | **15.832.193** | **14.630.949** |
| | **Eginpeningur** | | | | |
| | Partapeningur | 192.000 | 200.000 | 192.000 | 200.000 |
| | Uppskrivingargrunnur | 8.628 | 10.968 | 8.628 | 10.968 |
| | Flutt úrslit | 1.844.506 | 1.700.773 | 1.844.506 | 1.700.773 |
| | Uppskot til vinningsbýti | 67.200 | 70.000 | 67.200 | 70.000 |
| | **Eginpeningur hjá partaeigarunum í alt** | **2.112.335** | **1.981.742** | **2.112.335** | **1.981.742** |
| | Eigarar av hybridum kjarnukapitali | 150.754 | 0 | 150.754 | 0 |
| | **Eginogn í alt** | **2.263.088** | **1.981.742** | **2.263.088** | **1.981.742** |
| | **Skuld og eginpeningur í alt** | **18.173.399** | **16.703.555** | **18.095.281** | **16.612.691** |

# Kapitalgrundarlag og solvensur - BankNordik

| **Solvensur** | **31. des.** | **31. des.** |
|---|---|---|
| DKK 1.000 | **2019** | **2018** |
| | | |
| Kjarnukapitalur | 2,173,404 | 1,874,689 |
| Kapitalgrundarlag tilsamans | 2,397,490 | 2,098,167 |
| Váðavektað ogn tengd at kredittváða | 8,374,072 | 8,116,832 |
| Váðavektað ogn tengd at marknaðarváða | 1,299,559 | 1,308,662 |
| Váðavektað ogn tengd at rakstrarváða | 1,090,091 | 1,195,955 |
| Váðavektað ogn tilsamans | 10,763,722 | 10,621,449 |
| Veruligt kjarnukapitalprosent (CET1) | 18.8% | 17.7% |
| Kjarnukapitalprosent | 20.2% | 17.7% |
| Solvensprosent | 22.3% | 19.8% |
| | | |
| **Kjarnukapitalur og eginpeningur** | | |
| Partapeningur | 192.000 | 200.000 |
| Uppskrivingargrunnur | 8.628 | 10.968 |
| Ársúrslit | 206.631 | 262.097 |
| Framflyting, undanfarin ár | 1.712.623 | 1.557.762 |
| **Eginogn áðrenn frádrátt fyri keyp av egnum partabrøvum** | **2.119.882** | **2.030.828** |
| *Frádráttir:* | | |
| Vinningsbýti | 68.939 | 70.000 |
| Týðandi ognarskapur í fyritøkum í fíggjargeiranum | 0 | 5.740 |
| Egin partabrøv | 7.547 | 44.076 |
| Óítøkiligar ognir | 9.957 | 6.678 |
| Ætlað afturkeyp av egnum partabrøvum | 0 | 6.713 |
| Útskotin skattaogn | 4.960 | 18.496 |
| Varislig meting av fíggjarligum ognum | 5.828 | 4.436 |
| **Veruligur kjarnukapitalur** | **2.022.650** | **1.874.689** |
| Hybridur kjarnukapitalur | 150.754 | 0 |
| **Kjarnukapitalur** | **2.173.404** | **1.874.689** |
| | | |
| **Kapitalgrundarlag tilsamans** | | |
| Kjarnukapitalur | 2.173.404 | 1.874.689 |
| Eftirstillað kapitalinnskot | 224.086 | 223.477 |
| **Kapitalgrundarlag tilsamans** | **2.397.490** | **2.098.167** |



## Høvuðssæti

P/F BankNordik
Oknarvegur 5
P.O. Box 3048
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands
Tel. +298 330 330
Fax +298 330 001
E-mail: info@banknordik.fo
www.banknordik.fo

P/F skr. nr. 10, Tórshavn
SWIFT: FIFB FOTX

Partafelagið BankNordik hevur heimstað í Føroyum.

Felagið er skrásett á Nasdaq Keypmannahavn.

## IR Kontakt

E-mail: ir@banknordik.fo
Tel. +298 330 330

## Deildir

### Føroyar

**Tórshavn**
Oknarvegur 5
100 Tórshavn
Tel. +298 330 330

**Klaksvík**
Við Sandin 12
700 Klaksvík
Tel. +298 330 330

**Tvøroyri**
Sjógøta 2
800 Tvøroyri
Tel. +298 330 330

**Miðvágur**
Jatnavegur 26
370 Miðvágur
Tel. +298 330 330

**Saltangará**
Heiðavegur 54
600 Saltangará
Tel. +298 330 330

**Sandur**
Heimasandsvegur 58
210 Sandur
Tel. +298 330 330

**Kundatænastan**
Oknarvegur 5
100 Tórshavn
Tel. +298 330 330

**Vinnulívsdeildin**
Oknarvegur 5
100 Tórshavn
Tel. +298 330 330

**Markets**
Oknarvegur 5
100 Tórshavn
Tel. +298 330 330

**Ungdómsbankin**
Oknarvegur 5
100 Tórshavn
Tel. +298 330 330

### Danmark

**Amager**
Amagerbrogade 175
2300 København S
Tlf. +45 76 97 80 00

**Dragør**
Dragørhjørnet 2
2791 Dragør
Tlf. +45 76 97 80 00

**Frederiksberg**
Falkoner Allé 31
2000 Frederiksberg
Tlf. +45 76 97 80 00

**Haderslev**
Nørregade 32
6100 Haderslev
Tlf. +45 76 97 80 00

**Hvidovre**
Hvidovrevej 275
2650 Hvidovre
Tlf. +45 76 97 80 00

**Kolding**
Bredgade 15
6000 Kolding
Tlf. +45 76 97 80 00

**Kongelundsvej**
Kongelundsvej 267
2770 Kastrup
Tlf. +45 76 97 80 00

**Odense**
Vestergade 67
5000 Odense C
Tlf. +45 76 97 80 00

**Østerbro**
Østerbrogade 43
2100 København Ø
Tlf. +45 76 97 80 00

**Aarhus**
Mariane Thomsens Gade 1c, 4.sal
8000 Aarhus C
Tlf. +45 76 97 80 00

**Kundatænastan**
Rued Langgaards Vej 6-9, 4. sal
2300 København S
Tlf. +45 76 97 80 00

**Ungdomsbanken**
Østerbrogade 43
2100 København Ø
Tlf. +45 76 97 80 00

### Grønland

**Personal Banking**
Qullilerfik 2
3900 Nuuk
Tel. +299 34 79 00

**Corporate Banking**
Qullilerfik 2
3900 Nuuk
Tel. +299 34 79 00

P/F BankNordik
Oknarvegur 5
P.O Box 3048
FO-110 Tórshavn
Tel. +298 330 330
Fax +298 330 001
www.banknordik.fo

